# GLEÐI

SANGFAGNAÐUR

2023

Navn:

____________________________________

# Kórleiðarar & tónleikarar

## Kórleiðarar

### Barnakór:

- Hallgerð Brim
- Jannet Hanusardóttir Højgaard

### Juniorkór:

- Vivian Ole-Jacobsen
- Karin Petersen

### Felagskór:

- Fríðhild Danielsen
- Bjarta Ásbjørnsdóttir Arge

### Tónleikarar:

- Jórun Pólsdóttir
- Jóhan Mikkelsen
- Magni Højgaard
- Bjartur Fonsdal Johannesen
- Martin Rúni Joensen

# Innihaldsyvirlit

**Barnakórið:**

1. Tú gleðir meg
2. Gleði, tað er
3. Shackles

**Juniorkórið:**

4. Eg eigi gleði
5. Oh Happy Day
6. Guð eg lyfti navn títt høgt

**Felagskórið:**

7. Syng Gudi lov
8. Vit syngja, ja vit syngja
9. Tað er gott at vita
10. Veitslurómur er og gleði

# Tú gleðir meg

Orð og lag: Torben Støjberg Callesen, Camilla Jensen, Sara Valhøj

Týtt: Eileen Miðgerð Olsen

Vers:

Jesus, hesin heimur, hann er tín,
valdið eigur tú.
Fyllir mína sál og gleðir meg,
gleðin boblar í mær.
Jesus, tú vælsignar hvønn ein dag,
gevur mær mín mat.
Tínum ríkidømi oysir av,
ja, meg glaðan ger.

Niðurlag :

Tú gleðir meg, tú spjaðir frið,
eg lovsyngi tær.
Tú frøir meg og fyllir meg,
friðurin frá tær.
Tú elskar meg, ert vinur mín,
tú doyði fyri meg.
Jesus, eg elski teg.

Barnakór

# Gleði, tað er

Orð og lag: Ira F. Stanphill

Týtt: Hallgerð Brim og Jannet Højgaard, 2023

1.Gleði, tað er at kenna Jesus,
liva hvønn dag tætt hjá honum,
fylgja hans rødd og kærleiksboðum.
Jesus mín gleði er.

2.Gleði, tað er at vera saman,
Jesus og eg - hann meg leiðir,
styðjar mín fót og vegin greiðir.
Jesus mín gleði er.

Niðurlag:
Eg sælu fann,
hóast tár á kinni rann,
tí bara Jesus
mær sanna gleði vann!
Gleði, tað er trúgv og náði.
Jesus, frá tær frið eg fái.
Kærleika, vón, ja, alt eg eigi.
Jesus mín gleði er.

Barnakór

# Shackles

E. Atkins-Campbell, Erica Atkins-Campbell, T. Atkins-Campbell, W. Campbell. “Mary Mary”

Hendan versiónin er frá GospelRoots

Intro:

Take the shackles off my feet

I just wanna dance

Take the shackles off my feet

Come on lift your hands

Niðurlag: Take the shackles off my feet so I can dance

I just wanna praise You

I just wanna praise You

You broke the chains now I can lift my hands

And I'm gonna praise You

I'm gonna praise you

1. In the corners of my mind

I just can't seem to find

A reason to believe

That I can break free

Cause you see I have been down for so long

Felt like all hope was gone

But as I lift my hands

I understand

That I should praise You through my circumstance

Niðurlag: Take the shackles off my feet...

2. Everything that could go wrong
All went wrong at one time
So much pressure fell on me
I thought I was gonna lose my mind
Lord I know You wanna see
If I will hold on through these trials
But I need You to lift this load
Cause I can't take it no more

Niðurlag: Take the shackles off my feet...

Brúgv:
Take the shackles off my feet
I just wanna dance
To my Father’s heartbeat
Take the shackles off my feet
I just wanna dance
I just wanna dance

Niðurlag: Take the shackles off my feet...

Barnakór

# Eg eigi gleði

Orð og lag: Jórun Pólsdóttir

Eg gleðast kann um vinir
og um tá ið gongst mær væl,
um gávur og um vinsom orð,
um stuttleika og spæl.
Men kanska spyrt tú hvat ið mest av øllum gleðir meg?
Tað er at Jesus elskar teg og meg.

Eg eigi gleði sum er størri
enn tað sum hendir mær,
sum eingin tekur burtur,
tí eg veit, tí eg veit,
at Jesus sjálvur kennir meg
og Hann er altíð nær.
Eg gleðast kann, tí Jesus elskar meg.

Tá eg eri syrgin

og einsamallan kenni meg,

eg beri tað til Gud í bøn.

Jesus sigur nú við teg:

Mítt kæra barn sum stríðist,

tú so dýrabart ert mær

og allar dagar eri eg við tær.

Vita skalt tú, Jesus elskar teg.X2

Juniorkór

# Oh Happy Day

Orð og lag: Philip Doddridge

Hendan versiónin er frá GospelRoots

Oh, ooh, ooh, oooh

Oh, ooh, ooh, oooh

Oh, happy day, ooh happy day

Oh, happy day, ooh happy day

Oh, happy day

Oh, happy day

When Jesus washed

When Jesus washed

When Jesus washed

Oh, happy day, ooh happy day X2

He taught me how to listen watch, fight and pray

He taught me how to

rejoice ev-er-y day

Now I will listen to

what he has to say

Oh, every day

I’ll live rejoicing
in everything I say

He saved my soul and washed all my sins away
Now I will listen to
what he has to say
Oh, every day

Oh, Happy day...

He taught me how...
I’ll be rejoicing....

Oh, happy day, ooh happy day
Oh, happy day, ooh happy day

Oh happy day, oh happy day, oh happy
Oh happy day, oh happy day, oh happy,
Oh happy day, oh happy day, oh happy day

OH, HAPPY DAY

Juniorkór

# Guð eg lyfti navn títt høgt

Rick Founds

Guð eg lyfti navn títt høgt
Guð eg lovsyngi tær fegin
Gleðin um at tú ert mín
Og vilt leiða meg á vegin

Tú komst frá himli á jørð
At vísa veg
Frá krubbu til kross
At frelsa meg
Frá krossi til grøv
Frá grøv varð syndin søkt
Guð eg lyfti navn títt høgt

Juniorkór

# Syng Gudi lov

Orð og lag: Martin Alfsen

Týtt: Heri Tróndheim, 1992

Syng Gudi lov, slepp gleðini framat.

Syng Gudi lov, hann sálmin hoyra skal.

Syng Gudi lov, vit prísa navni hans.

Ja, heiður, vald og dýrdin alt er hans.

Lat nú hoyrast av vørrum várum,

hvør hann er, vit syngja um.

Eingin skeppa skal fjala ljósini her,

tí at bústaður mín á fjallinum bygdur er.

Til himna lovsong ber.

Felagskór

# Vit syngja, ja vit syngja

Orð og lag: Signe Walsøe

Útsett: Kirsten Bladt

Týtt: Gunnar Reynslág

Niðurlag:

Vit syngja, ja vit syngja,
allar klokkur ringja.
Jesus hjá við megi
fyllir oss við gleði.
Vit syngja, kenna ríkan,
Jesus ger oss fríðan.
Hann uggar oss í veikleika
og fyllir oss við kærleika.

1. Um alt tykist myrkt og svart,
bið til Jesus, lít á hann.
Eitt er púra víst og satt,
at gleði geva hann tær kann.

2. Ert tú nú í ringum lag,
minst tá til hvør Jesus er.
Til tín hevur Jesus sæð,
og lat hann greiða tína ferð.

Brúgv:
Komið við, syngið við,
syng um Jesus, syng um Hann.
Komið við, syngið við,
og kenna gleðin vellir fram.

Felagskór

# Tað er gott at vita

Orð og lag: Arnold Børud

Týtt: Etly N. Olsen og Morid S. Simonsen

1. Tað er gott at vita, (ekko)
at Gud er mær nær, (ekko)
hann er altíð hjá mær, (ekko)
eg siga skal tær, (ekko)
Sama hvat so hendir, (ekko)
so elskar hann meg. (ekko)
Øll: Hann vil altíð vera har
og leiða meg á sínum veg.

Niðurlag:
Eg verði glaður av at vita,
at Jesus hann er vinur mín.
Ja, hann er altíð her hjá mær
og hjálpir mær hvønn einasta dag.
Eg verði glaður av at vita,
at Jesus hann er vinur mín.
Ja, hann er altíð her hjá mær
og hjálpir mær hvønn einasta dag.

2. Trúfastur er Jesus, (ekko)

ímóti mær. (ekko)

Um eg eri keddur, (ekko)

um alt gongst mær væl. (ekko)

Hann vil bara troysta, (ekko)

tá eg eri kedd. (ekko)

Øll: Hann vil altíð vera har

og leiða meg á sínum veg.

Niðurlag:
Eg verði glaður av at vita,

at Jesus hann er vinur mín.

Ja, hann er altíð her hjá mær

og hjálpir mær hvønn einasta dag.

Eg verði glaður av at vita,

at Jesus hann er vinur mín.

Ja, hann er altíð her hjá mær

og hjálpir mær hvønn einasta dag.

Og hjálpir mær hvønn einasta dag.

Ja, hann hjálpir mær, hjálpir mær

hvønn einasta dag.

Felagskór

# Veitslurómur er og gleði

Orð og lag: Hans Jørn Østerby

Týtt: Gunnar Reynslág

Niðurlag:

Veitslurómur er og gleði,

tá eg komi heim.

Veitslurómur er og gleði,

tá eg komi heim.

Guð mær møtir har

við opnum ørmum í Jerusalem.

Hitta skal eg allar vinir mínar,

hond eg rætti teim,

tá eg komi heim.

1. Vers:

Tann yngri heiman rýmdi í barmi ynski ber.

Hann gjørdi tí tað valið í heimin út fer.

Heiman Faðirin hann syrgir, leingist so nógv hann.

Leingist eftir tí at fevna hann sín kæra son.

Knappliga ein dag hoyrir hann tá: “Minnist tú ei meg?”

Tá ljóðar so sælt: “Nú veitsla er! Tí saknaður tú vart!”

2. Vers:

Eg kenni ikki leiðina, sum her eg ganga má.

Mær møta man ymsum ei skil fái á.

Um eg haldi fast í Jesus og hann sleppur ei,

tá kann eg sjálvt í myrkri finna inn á røttu leið.

Á himli bíða einglar eftir teim, ið koma heim.

Tey hevja røddina, og nú tey kenna gleði, gleim.

Brúgv:

Slík veitsla, sum ei nakar her sá.

Kom og ver við.

Við á vegnum til Guðs land

til gleði, dýrd og frið.

GLEÐI

SANGFAGNAÐUR

2023